# Endurskoðan av gymnasialu útbúgvingunum

Samandráttur

Mentamálaráðið

© Mentamálaráðið, 2007
Ritstjórn: Eyðbjørn Poulsen og Mortan Zachariassen
Sniðgivið: Reproz
Umbrotið: Reproz
Myndir: Jógvan Andrias á Brúnni, Reproz
Prentað: Føroyprent
ISBN 99918-984-3-3

# Yvirlit


FORORÐ . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5

I VERANDI STØÐA . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

II TILMÆLI UM NEYÐUGAR BROYTINGAR . . . . . . . . . 9
Útbúgvingarskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Skúlabygnaður. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Lógarverk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

III DAGFØRD ÚTBÚGVINGARSKIPAN. . . . . . . . . . . . 11
Ein samanhangandi skipan . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
Upptøkutreytir. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
Vegleiðaraskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
Innleiðsluskeið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
Breytaskipan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
Lærugreinir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Førleikamál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Kjarnutilfar og ískoytistilfar . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Nýggir arbeiðshættir. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Eftirmeting og próvtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
Nýggjur próvtalsstigi. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15

IV DAGFØRDUR SKÚLABYGNAÐUR . . . . . . . . . . . . 17
Skúladeplar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
Skúladeplar sum sjálvsognarstovnar . . . . . . . . . . . . . 18
Karmar og fígging . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18

V DAGFØRT LÓGARVERK . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
Lógir. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
Kunngerðir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
Felags námsætlanir (lesiætlanir) . . . . . . . . . . . . . . 19
Dagført lógarverk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19

VI VERKSETING . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
Verksetingarfyriskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
Verksetingarætlan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22
Fortreytir fyri verkseting . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22

VII ENDI . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24

# Fororð



Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sum eitt av sínum politisku málum sett sær fyri at fáa endurskoðað tær gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar.

Í november 2005 setti hann nevnd við umboðum frá øllum gymnasialum miðnámsskúlum og Mentamálaráðnum at gera álit um, hvussu tær gymnasialu útbúgvingarnar skulu skipast í framtíðini.

Fyri at tryggja eitt breitt grundarlag undir teimum tilmælum, nevndin setir fram, hevur ein tilvísingarbólkur við umboðum frá yrkisfeløgum hjá lærarunum og øðrum áhugabólkum innan gymnasiala økið verið tengdur at arbeiðinum hjá nevndini.

Í arbeiðssetninginum, ið varð latin nevndini, sigur landsstýrismaðurin m.a.:

**Londini kring okkum dagføra støðugt sínar útbúgvingar, og t.d. er nýggj skipan sett í verk í Danmark í august 2005. Sum landsstýrismaður kenni eg tað sum mína skyldu at seta hetta á dagskránna, fyrst og fremst fyri at gera útbúgvingarmøguleikarnar hjá teimum ungu enn betri – men eisini fyri at fáa sum mest burturúr tí tilfeingi, vit hava.**

Landsstýrismaðurin leggur áherðslu á, at gymnasialu útbúgvingarnar:

- verða lagaðar eftir tí avmarkaða tilfeingi, sum eitt lítið samfelag hevur
- samstarva í øllum liðum
- verða á hædd við samsvarandi útbúgvingar í okkara grannalondum
- tryggja okkara ungdómi framhaldandi lestrarmøguleikar

Nevndin er á einum máli um, at vit eiga at síggja møguleikar í teimum dagføringum, sum framdar eru í Norðurlondum tey seinastu árini. Men við at seta eina kós, sum gagnar føroyska samfelagnum, stýra vit menningini, og lata ikki menningina stýra okkum. Soleiðis skulu vit vísa á gongdar leiðir.

Í álitinum, sum hetta er ein samandráttur av, verður verandi útbúgvingarskipan útgreinað, og uppskot til leist fyri eina endurskoðaða og meira greiða skipan viðgjørt.

Nevndin vónar, at álitið fer at birta upp undir eitt jaligt kjak og eina politiska viðgerð, ið greiðir veg fyri einari dagførdari og betri skipan fyri gymnasiala økið.

Hetta skylda vit teimum ungu.

Tórshavn 10. september 2007

Eyðbjørn Poulsen
*deildarstjóri og formaður*



Jákup Andreassen
*skúlastjóri*

Rúni Heinesen
*skúlastjóri*

Mikkjal Helmsdal
*rektari*

Reidar Nónfjall
*skúlastjóri*

Sámal í Skorðini
*rektari*

Mortan Zachariassen
*skrivari*

# I Verandi støða

Miðnámsútbúgvingar eru skipaðar í tvey øki: yrkisútbúgvingar og gymnasialar útbúgvingar:



*Mynd 1: Miðnámsútbúgvingar*




Meðan ein yrkisútbúgving gevur næmingum fakligan kunnleika til ávís yrki, hevur ein gymnasial útbúgving sum endamál at vera lestrarfyrireikandi. Gymnasialar útbúgvingar kunnu flokkast í tvey øki: yrkisgymnasialar og almenngymnasialar útbúgvingar. Støðisútbúgvingarnar eru í stóran mun felags fyri yrkisútbúgvingar og yrkisgymnasialar útbúgvingar, hóast endamálið við útbúgvingunum er ymiskt.

Endurskoðanin fevnir um gymnasialar útbúgvingar.

Nevndin hevur í sínum áliti staðfest, at verandi gymnasiala skipan:

- er fløkt
- byggir á eitt ov umfatandi lógarverk
- er ov lítið samskipað

Altjóðagerðin og nógv økta sambandið millum lond seta stór krøv til útbúgvingarpolitikkin. Vit liva í eini broytingartíð, við øktum møguleikum á útbúgvingarøkinum.

Tí er tað alneyðugt við einari meira samanhangandi og broytiligari útbúgvingarskipan, ið er lagað til fortreytirnar í føroyska samfelagnum.

Við støði í tilmælunum á síðu 9 og 10 gevur nevndin sítt boð um, hvussu gymnasiala útbúgvingarskipanin eigur at verða dagførd. Nærri grundgevingar verða givnar í álitinum.



# II Tilmæli um neyðugar broytingar



## Útbúgvingarskipan

- *Ein* gymnasial skipan eigur at verða sett á stovn, sum fevnir um allar verandi gymnasialar útbúgvingar.

- Gymnasiala skipanin skal tryggja okkara ungdómi framhaldandi lestrarmøguleikar.

- Ein neyvari samskipan eigur at verða millum tær ymsu gymnasialu útbúgvingarnar.

- Samstarvað eigur at verða um undirvísing og praktisk viðurskifti, har hetta ber til.

- Ásetingar um tvørfakligt samstarv, verkætlanararbeiði og KT eiga at verða tær somu í teimum ymsu útbúgvingunum.

- Føroyskar uppgávunevndir eiga at verða settar í mest møguligan mun.

- Próvtøkurnar eiga at verða samskipaðar betur.

- Roknskapir og hagtøl eiga at verða skipað á ein slíkan hátt, at til ber at útgreina virksemið eftir einum leisti, ið ger tað møguligt at samanbera okkum við grannar okkara.

- Krøvini í fólkaskúlanum og gymnasialu útbúgvingunum eiga at verða dagførd og samskipað.

- Vegleiðaraskipanirnar í fólkaskúlanum og á teimum gymnasialu útbúgvingunum eiga at verða endurskoðaðar og samskipaðar.

## Skúlabygnaður

- Skúlarnir, ið bjóða út gymnasialar útbúgvingar, eiga at verða skipaðir í deplar: ein í Norðuroyggjum/Eysturoy, ein í Streymoy og ein í Suðuroy.

- Samskiftið við og samstarvið millum skúlaleiðslurnar eigur at verða skipað eftir felags leisti og lagt í fastar karmar.

- Setanar- og arbeiðsviðurskiftini eiga at tillagast soleiðis, at hesi verða eins fyri gymnasiala økið.

## Lógarverk

- Lógar- og regluverkið eigur at verða skipað eftir felags leisti: felags lógir, kunngerðir og námsætlanir.

- Játtanarskipanin á økinum eigur at verða broytt soleiðis, at møguleiki verður fyri at veita eina 3-ára játtan.

Við støði í hesum tilmælum gevur nevndin sítt boð um, hvussu gymnasiala útbúgvingarskipanin eigur at verða dagførd. Nærri grundgevingar verða givnar í álitinum.



Tey uppskot, sum nevndin setur fram, fevna um:

- Útbúgvingarskipanina
- Skúlabygnaðin
- Lógarverkið
- Verksetingina

# III Dagførd útbúgvingarskipan



## Ein samanhangandi skipan

Ein gymnasial útbúgving skal fyrst og fremst fyrireika næmingar til hægri lestur. Av tí at yrkisútbúgvingar og gymnasialar útbúgvingar hava hvør sítt endamál, verður greiður skilnaður millum tær:

*Mynd 2: Gymnasiala útbúgvingarskipanin*




Yrkisútbúgvingar varðveita støðisútbúgvingarnar SIF, FHS og SIT, meðan gymnasialar útbúgvingar umboða eina samanhangandi gongd á tvey ella trý ár, men tað verður framvegis møguleiki fyri samstarvi, samlestri og avriksflutningi.

## Upptøkutreytir

Yvirskipaðu treytirnar verða varðveittar, tó so at metingarstøðið verður endurskoðað soleiðis, at tað verður samskipað og greiðari lýst.

## Vegleiðaraskipan

Ein samskipað føroysk vegleiðaraskipan skal virka fyri, at næmingar í fólkaskúlanum og miðnámsútbúgvingunum gerast tilvitaðir um útbúgvingarmøguleikar og krøv.

## Innleiðsluskeið

Eitt lestrarfyrireikandi innleiðsluskeið skal verða við til at byggja brúgv millum fólkaskúla og miðnámsskúla og leggja lunnar undir, at næmingarnir klára útbúgvingina til ásetta tíð. Eitt av aðalmálinum við skeiðinum er at kunna um krøv og innihald, og gera næmingarnar tilvitaðar um, hvussu teir læra.

## Breytaskipan

Ein samanhangandi skipan við ymiskum útbúgvingarbreytum, ið varðveita tey sereyðkenni, sum verandi útbúgvingar hava, verður sett á stovn. Næmingar velja breyt í umsóknini, men møguleiki verður fyri at skifta breyt í fyrstu lestrarhálvu, tv.s. áðrenn eitt hálvt ár er runnið.

*Mynd 3: Breytaskipanin*






Havast skal í huga, at talan er um útbúgvingar og ikki um skúlar. Føroya Handilsskúli fer framhaldandi at bjóða út handilsgymnasialar útbúgvingar, Føroya Studentaskúli og HF-skeið fer framhaldandi at bjóða út gymnasialar útbúgvingar innan náttúruvísind, hugvísind o.s.fr.

## Endamálið við breytaskipanini er at veita skúlum størri sjálvræði og geva rúm fyri nýhugsan og menning.

Brotastrikan sipar til, at skúlar eftir góðkenning frá myndugleikanum kunnu seta á stovn, taka av ella samstarva um breytir, í tann mun samlaða útboðið av breytum er tíðarhóskandi og samfelagnum at gagni.

## Lærugreinir

Lærugreinir eru býttar sundur í kravdar lærugreinir og vallærugreinir. Kravdar lærugreinir eru aftur býttar upp í felagslærugreinir og breytalærugreinir:

*Mynd 4: Lærugreinir*






*Felagslærugreinir* eru kravdar lærugreinir á einum ávísum stigi fyri allar næmingar, ið taka eina gymnasiala útbúgving. Felagslærugreinir skulu tryggja grundleggjandi almennandi og lestrarfyrireikandi førleikar. Hóast lærugreinirnar eru felags, vilja tær bera dám av tí breytini, sum næmingurin gongur á.

*Breytalærugreinir* eru kravdar lærugreinir á einum ávísum stigi, sum eru serligar fyri ta einstøku breytina. Breytalærugreinir skulu við øðrum orðum mynda valið av lestrarleið.

*Vallærugreinir* skulu geva næmingum høvi at velja eitt ávíst tal av lærugreinum eftir áhuga.

Har tað er møguligt, skulu breytir samstarva um útboðið av lærugreinum. Allar lærugreinir eru á gymnasialum A-B-C-stigi, har A er hægsta stigið.

## Førleikamál

Námsætlanir (lesiætlanir) verða orðaðar av nýggjum eftir einum felags leisti – frá fyrsta ári í fólkaskúlanum til síðsta árið í einari gymnasialari útbúgving.

Førleikamál koma í staðin fyri pensumkrøv. Førleikamál skulu greitt lýsa endamálið við undirvísingini, tvs. hvørjar førleikar næmingarnir skulu hava eftir lokna undirvísingargongd. Endamálið við førleikamálum er:

- at tryggja felags støði í undirvísingini
- at geva lærarum og næmingum størri sjálvræði
- at tryggja samanhang og stigvøkstur

Førleikamál skulu virka fyri, at dygdin í undirvísingini verður støðugt ment, og eru týdningarmikil liður í arbeiðinum at byggja brúgv millum fólkaskúla og miðnámsskúla.

## Kjarnutilfar og ískoytistilfar

Innihaldið í lærugreinunum verður býtt sundur í kjarnutilfar og ískoytistilfar:

*Mynd 5: Innihaldið í lærugreinunum*






Kjarnutilfarið er fakligt innihald, sum myndar kjarnuna í lærugreinini. Ískoytistilfarið er fakligt innihald, sum einstaki lærarin í samráði við næmingarnar leggur afturat kjarnutilfarinum. Ískoytistilfarið skal geva rúm fyri sjálvræði og menning. Bæði kjarnutilfar og ískoytistilfar skulu umboða øki ella evni, ið virka fyri, at førleikamálini verða rokkin.

Næmingar fara til skrivliga próvtøku í kjarnutilfari og til munnliga próvtøku í kjarnu- og ískoytistilfari.



## Nýggir arbeiðshættir

Vanliga floksundirvísingin verður varðveitt, tí hon fevnir ikki bert um ein, men fleiri ymiskar arbeiðshættir, sum heilt greitt hava sínar dygdir. Fyri at økja um læringarúrtøkuna, skulu nýggir arbeiðshættir takast í nýtslu. Nýggju arbeiðshættirnir snúgva seg í høvuðsheitum um:

- Toymisarbeiði
- Tvørfakligt samstarv
- Verkætlanararbeiði

Toymisarbeiði skal tryggja eina felags fatan av endamálinum við undirvísingini og menna dygdina við støði í teimum royndum, sum einstaki lærarin og toymið gera sær.

Tvørfakligt samstarv skal læra næmingar at hugsa lærugreinir í nýggjum høpi og á tann hátt virka fyri at víðka fakliga innlitið.

Verkætlanararbeiði skal serstakliga savna seg um evnislagaðar verkætlanir. At arbeiða evnislagað merkir, at næmingar sjálvstøðugt og saman við øðrum duga at gera uppgávuorðingar (vandamálsorðingar), leita fram viðkomandi tilfar, leggja til rættis og evna til verkætlanir.

Nýggir arbeiðshættir skulu eggja til eitt meira livandi lestrarumhvørvi, sum ger undirvísingina betri, meira viðkomandi og innihaldsríka.

## Eftirmeting og próvtøka



Eftirmetingar skulu savna seg um partsmál (ávegis mál) og virka fyri fakligari og persónligari framgongd hjá næmingum. Próvtøkur skulu vísa, í hvønn mun næmingar hava rokkið endamálunum, sum lýst eru í námsætlanunum.

Fyri at menna dygdina í undirvísingini, skal førleikin hjá lærarum til at eftirmeta mennast. Næmingar skulu eisini regluliga eftirmeta undirvísingina.

Próvtøkuhald skal koma undir felags reglur.

## Nýggjur próvtalsstigi

Í august 2008 verður nýggjur próvtalsstigi settur í verk í øllum útbúgvingum í Føroyum. Talan er um ein „absoluttan“ próvtalsstiga, tað merkir, at greitt samband verður millum rokkin førleikamál og givið próvtal.



# IV Dagførdur skúlabygnaður

Miðnámsskúlarnir verða savnaðir í størri eindir við størri sjálvræði í øllum liðum. Talan verður um hesi trý øki:

- Norðuroyggjar/Eysturoy
- Streymoy
- Suðuroy

## Skúladeplar

Í hvørjum øki verður ein skúladepil settur á stovn við skikkaðum depilsstýri, depilsstjóra, felags umsiting og lestrar- og yrkisvegleiðing (L&Y). Mynd 6 vísir dømi um bygnaðin fyri skúladeplar:

*Mynd 6: Dømi um bygnaðin fyri skúladeplar*



Í Norðuroyggjum/Eysturoy verða umleið 700 næmingar knýttir at skúladeplinum, í Streymoy uml. 1100 næmingar og í Suðuroy umleið 125 næmingar. Dagliga leiðslan í deplunum verður sett saman av depilsstjóranum og leiðslunum fyri hvørt økið. Innanhýsis leiðslubygnaðurin í skúladeplunum verður skipaður eftir uppgávum og stødd hjá einstaka deplinum.

## Skúladeplar sum sjálvsognarstovnar

Skúladeplarnir verða skipaðir sum sjálvsognarstovnar, og umsitingarliga stýringin verður flutt frá myndugleikanum til deplarnar. Myndugleikin fer í størri mun at taka sær av felags umsjónar- og menningaruppgávum, og formligt samstarv verður millum myndugleikan og skúladeplarnar.

Landsstýrismaðurin setir depilsstýrini, og depilsstýrið setir depilsstjóran, sum verður áramálssettur. Depilsstjórin setir í starv økisleiðslur, lærarar og onnur starvsfólk. Mynd 7 lýsir bygnaðarligu viðurskiftini millum myndugleikan og skúladeplarnar:



*Mynd 7: Deplar í mun til myndugleika*




Tað hevur avgerandi týdning fyri skipanina, at ábyrgd og myndugleiki fylgjast at í øllum liðum, og at høvuðsdentur verður lagdur á tann leiklut og tær uppgávur, sum skúladeplarnir skulu hava.

## Karmar og fígging

Frameftir verða karmar skaptir fyri skúlavirkseminum, sum tryggja eitt framtíðar lestrar- og arbeiðsumhvørvi. Miðnámsskúlar verða bygdir saman í størri eindir, soleiðis at tað gerst møguligt at samstarva meira ítøkiliga um útbúgvingarvirksemið í øllum liðum.

Virksemið verður fíggjað við einari mál- og rammuskipan, har fígging verður latin skúladeplinum eftir næmingatalinum.

# V Dagført lógarverk

## Lógir

Lógarverkið verður endurskoðað í øllum liðum. Verandi sjey útbúgvingarlógir verða orðaðar í eina felags rammulóg. Ein stovnslóg verður galdandi fyri allar gymnasialar skúlar.

## Kunngerðir

Ein høvuðskunngerð kemur í staðin fyri sjey útbúgvingarkunngerðir. Aðrar kunngerðir skulu skrivast saman í felagskunngerðir.

## Felags námsætlanir (lesiætlanir)

Faklærarar og onnur serkøn orða námsætlanir eftir felags leisti, sum myndugleikin góðkennir. Hvør lærugrein hevur eina námsætlan, galdandi fyri eitt ávíst stig í øllum útbúgvingum.

## Dagført lógarverk

Eitt dagført lógarverk viðførir í minsta lagi hesa broyting:

*Mynd 8: Dagført lógarverk*




Kelda: Mentamálaráðið

Dagførda lógarverkið skal virka fyri betri dygd og størri framtakssemi.



**Á strategiskum stigi verður arbeitt við langtíðarmálum, á taktiskum stigi verður arbeitt við millumtíðarmálum og á operativum stigi verður arbeitt við ítøkiligum stutttíðarmálum.**

# VI Verkseting



## Verksetingarfyriskipan

Verksetingin verður skipað í trý stig: 1) strategiskt stig, 2) taktiskt stig og 3) operativt stig. Á strategiskum stigi verður arbeitt við langtíðarmálum, á taktiskum stigi verður arbeitt við millumtíðarmálum og á operativum stigi verður arbeitt við ítøkiligum stutttíðarmálum. Mynd 9 lýsir verksetingarfyriskipanina:

*Mynd 9: Verksetingarfyriskipan*




Myndin vísir, at uppskotini frá nevndini skulu gerast ítøkilig á tí operativa stiginum. Her verða arbeiðsbólkar mannaðir við lærarum og øðrum serkønum fólki í gymnasialu útbúgvingarskipanini. Úrslitið av hesum arbeiði skal viðgerast saman við avvarðandi áhugabólkum. Verksetingarfyriskipanin er útgreinað nærri í mynd 14 á síðu 57 í álitinum.

Skipanin skal regluliga eftirmetast í øllum liðum, og uttanhýsis eftirmeting verður framd 5. hvørt ár í samstarvi við norðurlendskan serkunnleika.

## Verksetingarætlan

Verksetingarætlanin í mynd 10 lýsir verandi støðu í mun til ynskiliga støðu, og hvussu komið verður á mál.

*Mynd 10: Verksetingarætlan*




Tikið verður hædd fyri avbjóðingum og viðurskiftum, sum hava avgerandi týdning fyri ætlanina.

Verksetingarætlanin er útgreinað nærri í mynd 15 á síðu 58 og 59 í álitinum.

## Fortreytir fyri verkseting

**Játtanin til gymnasialu útbúgvingarnar verður hækkað við góðum 10 mió. kr. komandi fýra árini. Hetta svarar til 6,7 mió. kr. hækking í rakstrarjáttan, sum heldur fram, og 3,7 mió. kr. í játtan, sum ikki krevur endurjáttan á hvørjum ári.**

### Leiðslur

- Deplarnir verða skipaðir við skikkaðum stýrum.
- Depilsstjórarnir skulu hava fakligar og persónligar leiðsluførleikar og eina breiða námsfrøðiliga fatan.
- Økisleiðslurnar skulu hava námsfrøðiligar royndir, serkunnleika innan einstøku breytirnar og umsitingarligt innlit.

### Lærarar
- Lærarar skulu verða fakliga og námsfrøðiliga skikkaðir.

### Eftirútbúgving og skeið
- Samskipað eftirútbúgvingarskipan skal verða sett á stovn.

### Dygdarmenningarskipan
- Ein dygdarmenningarskipan verður sett í verk.

### Arbeiðs- og sáttmálaviðurskifti
- Farast skal undir eina tilgongd saman við yrkisfeløgum, ið hevur til endamáls at fáa somu arbeiðs- og setanarviðurskifti fyri allar lærarar á gymnasiala økinum.

### Hølisviðurskifti
- Skúlaumhvørvið skal skipast við skúlastovum, lestrarrúmum og bólkarúmum.
- Lærarar skulu hava fastan arbeiðsstað í skúlanum.



### Lærugreinaráðgevar og uppgávunevndir
- Lærugreinaráðgevar skulu setast í føroyskum/donskum, enskum, støddfrøði, søgu/samfelagsfrøði og alisfrøði/evnafrøði.
- Uppgávunevndir skulu setast í lærugreinum, har lærugreinarráðgevar eru settir, og føroyskar uppgávunevndir verða annars settar í størst møguligan mun.

### Tilfeingi hjá myndugleikanum
- Menningarfulltrúi verður settur til at dagføra og menna gymnasialu útbúgvingarnar.

### Kunning og ummæli
- Áhugabólkar og almenningur verða væl kunnað og hoyrd um endurskoðanararbeiðið.

# VII Endi



Við hesum hevur nevndin latið úr hondum álit við strategiskum uppskoti um eina dagførda gymnasiala skipan. Nevndin vónar, at uppskotið fær eina góða politiska viðgerð, og at eitt ítøkiligt úrslit fer at spyrjast burturúr.

Ein týðandi partur av arbeiðinum hevur verið at fingið innlit í skipanirnar í okkara grannalondum og at gera gagn av teimum broytingum, sum eru framdar tey seinnu árini.

Áherðsla hevur verið løgd á, at allir partar, ið varða av gymnasiala økinum, hava verið umboðaðir. Nógv góð ráð og nógv góð hugskot eru komin frá teimum, og øll eiga tey stóra tøkk uppiborna fyri, at álitið nú er búgvið til at verða lagt fram fyri løgting og almenning til umrøðu og orðaskifti.